# Soleiðis váttar tú arbeiðsloysi á als.fo




ALS

# Vátta arbeiðsloysi á als.fo

Tú váttar arbeiðsloysi við at fara inn á heimasíðuna als.fo, ovarliga til høgru á forsíðuni er ein slóð til Sjálvgreiðsluna.



# ALS-vika

ALS-dagurin er nú broyttur soleiðis, at tú nú kanst vátta arbeiðsloysi í eina heila viku. ALS-vikan byrjar mánamorgun (kl. 00.00) og endar fríggjadag kl. 12.00. Arbeiðsloysisstuðulin verður útgoldin týsdag í vikuni aftaná. Um tú letur fráboðanina inn eftir kl. 12.00 fríggjadag, fært tú ikki arbeiðsloysisstuðulin rættstundis.

Tá tú skalt vátta arbeiðsloysi, skalt tú velja hendan teigin


Innrita

**Vælkomin til Sjálvgreiðsluna**

**Fyll út ALS-kort (Vátta arbeiðsloysi)**
Øll, sum fáa arbeiðsloysisstuðul, skulu fylla út ALS-kort. Við ALS-kortinum váttar tú tína støðu á arbeiðsmarknaðinum í seinasta útgjaldsskeiði, t.e. seinastu 14 dagarnar. hjálp
Fyll út ALS-kort

**Boða frá um broytta støðu**
Tá tú fært arbeiði, fert í skúla ella av øðrum grundum ikki ert arbeiðsleys/ur longur, skalt tú boða ALS frá. hjálp
Boða frá um broytta støðu

**Søk um arbeiðsloysisstuðul**
Fyri at fáa arbeiðsloysisstuðul, mást tú fyrst boða ALS frá, at tú ert arbeiðsleys/ur og síðan senda inn skrivligt umsóknarblað. hjálp
Søk um arbeiðsloysisstuðul

**Síggj og broyt útfylt ALS-kort**
Her sært tú yvirlit yvir tíni ALS-kort og fráboðanir. Til ber at broyta í ALS-kortum har freistin enn ikki er úti, umframt í ALS-kortum har upplýsingarnar eru ófulfíggjaðar.
Síggj og broyt útfylt ALS-kort

**Síggj tíni útgjøld**
Her sært tú hvussu nógvan stuðul tú hevur fingið. Eisini ber til at síggja eina útgreining av hvussu stuðulin er roknaður.
Síggj tíni útgjøld

# Tey 5 stigini

1. Innrita
2. Vel tíðarskeið
3. Boða frá arbeiði
4. Onnur fráboðan
5. Góðkenn váttan

# Soleiðis váttar tú arbeiðsloysi

Her sært tú, hvussu gongdin at vátta arbeiðsloysi í Sjálvgreiðsluni á als.fo er. So hvørt sum tú fyllir teigarnar út, fært tú nágreinilig boð um, hvussu tú skalt gera.

## 1 Innrita

Tú innritar við tínum brúkaranavni og loyniorði.

1. Skriva títt **brúkaranavn**
2. Skriva títt **loyniorð**
3. Trýst á **Innrita**




## 2 Vel tíðarskeið og støðu

Her velur tú tíðarskeiðið, sum tú skalt hava útgjald fyri. Eisini boðar tú frá, um tú hevur havt inntøkur í hesum tíðarskeiði.

1. **Vel tíðarskeiðið**, sum útgjaldið er fyri
2. Boða frá, at tú einki arbeiði hevur havt, ella um tú hevur havt arbeiði í hesum tíðarskeiði
3. Trýst á **Næsta stig**




## 3 Boða frá arbeiði

Her boðar tú frá, hvar tú hevur arbeitt, hvussu nógvar tímar tú hevur arbeitt, og hvussu nógva løn, tú hevur forvunnið.

1. Skriva **v-tal** hjá arbeiðsgevara
2. Skriva **tal av tímum**, tú hevur arbeitt
3. Skriva, hvussu **nógv** tú hevur forvunnið




Um tú hevur fingið fundarsamsýning ella aðra samsýning, skalt tú boða frá hesum. Hetta verður gjørt á sama hátt, sum tá tú boðar frá arbeiði.

## 4 Onnur fráboðan

Her boðar tú frá, um tín støða er broytt í mun til útgjald frá ALS.

Tey, sum ikki eru tøk á arbeiðsmarknaðinum, hava ikki rætt til arbeiðsloysisstuðul.

Tú boðar frá, um tú:

· onga fráboðan hevur
· hevur fingið arbeiði
· ert farin í skúla
· ert sjúkrameldað/ur
· ert farin í barnsburðarfarloyvi
· ert á skeiði
· heldur frí




## 5 Góðkenn váttanina

Her kannar tú eftir, um upplýsingarnar, tú hevur givið, eru rættar. Síðani góðkennir tú váttanina um arbeiðsloysi

1. Kanna, um upplýsingarnar eru rættar
2. Trýst á Góðkenn

Tú fært avrit av váttanini um arbeiðsloysi senda við telduposti.




## ? Hjálp á netinum

Meðan tú váttar arbeiðsloysi, ber til at fáa vegleiðing við at trýsta á knøttin ? hjálp.

Fólk, sum ikki hava atgongd til teldu, kunnu fyrstu tíðina ringja til ALS og avgreiða síni viðurskifti.




**Tel 34 95 50**

ALS
Arbeiðsloysisskipanin · Tinghúsvegur 14
Tel 34 95 50 · Fax 34 95 51 · www.als.fo · als@als.fo

sansir.fo